

## Stuðulsfólk til børn

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki 3–4 tímar um dagin, 15–20 tímar um vikuna. Uppgávan verður at fylgja tveimum børnum í vøggustovu um morgunin og heinta tey aftur seinnapart.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur viðkomandi royndir innan økið.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar Kommunu, Barnaverndartænastuna, Postsmoga 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. januar 2009.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Baranverndartænastuna á tlf. nr. 30 20 60.

**Tórshavnar kommuna**

Tveir túrar til

# Passiónsspælið í Oberammergau 2010

**29. mai - 10. juni 2010**
Oberammergau og Kroatia

**21. august - 01. september 2010**
Oberammergau - Italia

Ring og hoyr nærri á tel 31 44 64
ella send ein teldupost til mourits@mb.fo

MB-TOURS

## Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum - søkir eftir skrivstovunæmingi

*Vit eru ein lítil deild, sum hevur brúk fyri einum skrivstovunæmingi. Umframt at læra um hentleikar, sum hoyra nútímans skrivstovuni til, kemur tú tí at læra nógv um lønir, sáttmálar og sáttmálatrætur, eins og tú kemur í mangar aðrar krókar í almennu fyrisitingini. Uppgávurnar eru fjølbroyttar og vit hava við mestsum allar samfelagsbólkar at gera. Hvussu long lærutíðin er, veldst um, hvørja útbúgving tú hevur. Skúlagongdin er í Danmark.*



**Førleiki**
Vit vænta, at tú hevur miðnámsprógv, at tú dugir væl at skriva og rokna, og ert tú teldusnillingur, so er tað bara ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Súsonnu í Stórhúsi, tlf. 352210 ella Snorra Fjallsbak, tlf. 352220.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin tann 14. januar 2009 klokkan 14.00.
Send til:

lnd@lnd.fo
ella
Fíggjarmálaráðið, Lønardeildin
Kvíggjartún 1, Postsmoga 2039, 165 Argir

Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur um hendi almennar lønir og setanartreytir. Høvuðsuppgávurnar eru at samráðast við fakfeløg um sáttmálar og avtalur fyri størv hjá landinum. Vit umsita tænastumannalóggávuna, flokka størv og góðkenna individuellar treytir. Vit ráðgeva ráðunum í arbeiðsrættarligum og setanar-rættarligum spurningum. Lønardeildin heldur til í Fíggjarmálaráðnum saman við øðrum stovnum. Her eru góðar arbeiðsumstøður og kantinuviðurskifti. Lønardeildin hevur eina flekstíðarskipan. Sí annars www.lnd.fo